Sjálvsálitið er gott

FINALUDYSTUR
Jákup Mørk

– Jú. Spenningurin her suðuri er øðiligur, svarar Eyðbritt Krosslá, tá vit undan finaludystinum fingu orðið á hana.

– Her verður so at siga ikki tosað um annað, og eisini tey, sum ikki áður hava sýnt hondbóltinum so stóran ans, tykjast nú vera á gosi undan dystinum, sigur hon.

Spurd, um tey har suðuri hava fingið smakkin av gulli, nú menninir vunnu hava vunnið gull í fótbólti, svarar hon, at tað kann so væl vera, at hetta hevur smittað av.

Nýtast ikki hjálp

Men hvønn týdning hevur steypafinalan fyri VB. Vit spurdu Eyðbritt, um týdningurin var størri í ár, nú møguleikin fyri FM tykist at vera fokin hjá teimum.

– Í øllum førum kunnu vit avgera hetta sjálvar, í mótsetning til FM, har vit bara mugu vóna at fáa hjálp frá øðrum. Her hava vit møguleikan, og honum ætla vit okkum sjálvsagt at taka av.

– Skulu vit vinna dystin, er neyðugt, at vit fáa tað skjóta og góða spælið fram, sum vit hava spælt í seinastuni. Burtursæð frá seinastu løtuni av landskappingardystinum móti Stjørnuni, hava vit spælt væl í seinastuni, og hetta skulu vit halda fast um.

Skerdar

VB liðið er tó eitt sindur skert undan finaludystinum. Í øllum førum stendur greitt, at hvørki Sólrun Krosslá ella Rannvá Augustinussen eru tøkar, men umframt tær báðar, sum eru úti við hvør sínum brotnum armi, er eisini ivamál um onkrar aðrar. Eyðbritt greiðir frá, at hóskvøldið vóru Guðrun í Lágabø, Laila Jespersen og Andrea Lütz allar sjúkar.

Tað er einki at ivast í, at um tær ikki eru tøkar, er hetta ein dyggur smeitur hjá liðnum, men kortini tykist liðskiparin ikki at hava mist mótið, tá vit at enda spurdu hana, hvør fer at vinna dystin.

– Tað ætla vit so okkum at royna at gera. Í fjør góvu vit føroya fólki ein sera góðan dyst, og tað ætla vit okkum eisini at gera í ár. Hesa ferð skal tað bara vera soleiðis, at vit eru fremri, tá dysturin er lokin.

– Eg haldi eisini, at vit eru meira róligar í ár, tí gongdin hevur verið sera góð. Í fjør høvdu vit bert vunnið einar tríggjar dystir undan finaluni, so sjálvsálitið er betri í dag enn ta ferðina, sigur Eyðbritt Krosslá at enda.

Øll hava møguleikan

FINALUDYSTUR
Jákup Mørk

Okkum eydnaðist tíverri ikki at fáa fatur á lið-skiparanum hjá VÍF, Sóleyð Mikkelsen. Ístaðin fyri settu vit okkum í samband við venjaranum hjá VÍF, Daniel Rápa.

Allar eru klárar

Tá vit spurdu hann, um tey høvdu gjørt nakað serligt burtur úr fyrireikingunum til dystin, svarar hann, at tey sjálvsagt hava hugsað nógv um uppgávuna.

– Vit hava fyrireika okkum so væl sum gjørligt, og eg haldi, at hvør einstakur leikari nú er klár til at fara inn á vøllin til ein finaludyst.

Annars hevur ivamál verið um, hvørt Nicolina Eyðbjørnsdóttir fór at vera tøk, men líkt er til, at hon er sloppin av við liðbandsskaðan, sum hevur plágað hana í seinastuni.

Øll hava møguleikan

Spurdur, um tað kanska er nakað serligt, at Vestmanna eigur annan partin í báðum finalunum, sigur Daniel, at tað er tað kanska. Hinvegin leggur hann stóran dent á, at hetta ikki nýtist at merkja tveir sigrar.

– Tað eru til samans fýra lið í teimum báðum finalunum, og sjálvandi hava tey øll møguleikan at vinna. Øll vóna tað besta, og øll fara at spæla fyri sínum møguleika, og tað ætla vit okkum eisini.

Men hvørjar fortreytir skulu so lúkast, um tað skulu verða tit, sum vinna?

– Tað týdningarmesta er, at allar hjá okkum eru uppsettar. Talan er bert um ein dyst, og tí er ikki rúmd fyri mistøkum. Har umframt er tað eisini av sera stórum týdningi í einum slíkum dysti, at byrjanin er góð. Tað hevur eydnast væl hjá okkum í seinastuni, og tað vóni eg, at vit aftur fáa leygardagin.

Býttur spurningur

Tá vit at enda spurdu Daniel, hvør fer at vinna steypafinaluna hjá kvinnunum, er hann als ikki so nógv fyri at gera nakran til favoritt.

– Eg veit ikki hví, men blaðmenn skulu altíð seta handan býtta spurningin. Tað er jú einki sum helst avgjørt í so máta, og eg rokni báðar dystirnar fyri at vera púrasta opnar. Hvat lið vinnur fæst ikki at vita fyrr enn ávíkavist kl. fýra og hálvgum seks, sigur ein flennandi Daniel Rápa at enda.

Roknar við at vinna

FINALUDYSTUR
Jákup Mørk

At hondbóltsfepurin er høgur í Vestmanna fyri tíðina kann so avgjørt ikki leypa hvøkk á nakran.

Liðskiparin hjá vestmenningum, Ingi Olsen, ásannar eisini, at so er, men hinvegin vísur hann á, at tað sum so ikki bara er til tað betra.

– Tað kann eisini vera vandamikið hjá okkum, at øll eru vorðin so sigursvand. Áskoðararnir hava langt síðani tikið tað fyri givið, at vit fara at vinna alt í ár, og tað grøvina mugu vit so avgjørt ikki fella í.

– Teir flestu av okkum minnast eisini til 1994, tá vit so at siga vunnu alt, men so brádliga taptu fyri Neistanum í finaluni. Tað má so avgjørt ikki henda, og tí skulu vit ikki taka nakað fyri givið, hóast vit frá flestu síðum verða roknaðir sum favorittar.

– Tað er so heilt víst, at fer tað at ganga illa, so kunnu nervar og annað fara at gera seg galdandi, og so kann alt henda, sigur Ingi, sum tó ikki á nakran hátt roynir at skáka sær undan favorittleiklutinum.

Breiðan hóp

Tað hevur hann sum so heldur ikki orsøk til, og hann ásannar eisini, at sjálvsálitið hjá leikarunum er í lagi undan dystinum.

– Eg vil siga tað soleiðis, at vit onga orsøk hava til, ikki at hava gott sjálvsálit. Mett eftir stigatalvuni, so hava vit tað besta liðið í landinum, men hinvegin er hetta bara ein dystur. Vit hava bert hendan møguleikan, og so er at taka av.

Alt fólkið hjá VÍF er annars tókt til dystin, og hetta metir liðskiparin so avgjørt eisini vera eina styrki hjá teimum.

– Vit hava ein sera breiðan hóp, og millum annað hava vit sæð hetta aftur í, at vit eisini hava vunnið sannførandi, meðan fleiri leikarar hava verið úti. Harafturat hava flestu av leikarunum verið í gongd, meðan landsdystirnir hava verið, sigur Ingi.

Í hesum sambandi vísir hann á, at VÍF jú hevði fleiri spælarar á landsliðnum, og harumframt vóru aðrir, sum høvdu møguleikan at spæla á aðru deild, men fremsta deildin lá still, so dystarvenjingin skuldi verið í lagi hjá teimum allarflestu.

At sjálvsálitið er gott, speglar seg eisini aftur í svarinum, tá vit at enda spyr, hvør fer av vøllinum sum vinnari.

– Tað rokni eg við, at vit fara at vinna. Eg fari so ikki at royna burturforklára, at vit eru favorittar. Tað vilja tey flestu gera okkum til, og tað mugu vit so taka á okkum, sigur Ingi Olsen at enda.

Koyra okkara spæl

FINALUDYSTUR
Jákup Mørk

Hjá StÍF er tað landsliðsmálverjin, Jóhan Danielsen, sum fer at føra sínar menn inn til dystin, og hann dylir ikki fyri, at spenningurin er stórur.

– Nú búgvi eg ikki ordiliga har, sum tað hendir (Jóhan býr í Lamba blðm.), og tað er kanska eisini bara gott. Áhugin á Skála og á Strondum er sjálvandi øgiliga stórur, og longu nú eru fólk farin at gita, hvussu vit ætla okkum at spæla og soleiðis. Tað hoyrir jú til ein slíkan dyst, og er bara stuttligt, men kortini eri eg eitt sindur lættur um, at eg ikki eri á staðnum alla tíðina. So kann eg kanska taka tað eitt sindur róligari upp til dystin.

Um dysturin í dag hevur nakran serligan týdning, sigur Jóhan, at sjálvandi hevur hann tað.

– Nú skal eg ikki siga, at møguleikin fyri FM er fokin, men tað verður í øllum førum sera trupult. Tí er hetta okkara besti møguleiki at vinna nakað í ár, so sjálvsagt er týdningurin stórur.

Byrja í verjuni

Hvørja uppskrift strandingar skulu nýta, til tess at basa vestmenningum, vil Jóhan sum so ikki siga nakað um.

– Eg haldi, at vit fyrst og fremst skulu hugsa um, at vit í hesum dystinum verða mettir sum outsidarar. Vit hava einki at tapa og alt at vinna, og tann hugburðin skulu vit hava við okkum á vøllin. Fólkið á liðnum er nóg gott, og tí ræður um at finna rætta vilja til dystin.

– Annars vil eg siga, at tað hjá okkum ræður um at fáa verjuspælið at rigga. Hetta er fortreytin fyri, at vit kunnu spæla tað skjóta álopsspælið, sum er okkara styrki.

Til dystin roknar Jóhan annars við, at allir leikarar eru tøkir. Sum so heldur hann ikki, at talan er um ivamál av nøkrum serligum slag, og stingur einki óvæntað seg upp, verður hópurin tí fullsettur leygardagin.

Og vónirnar fyri at vinna eru sjálvandi góðar.

– Eg veit væl, at vit kanska ikki eru favorittar, men tað er einki at ivast í, at eg trúgvi upp á okkara møguleika. Fáa vit okkara spæl at koyra, so rokni eg avgjørt við, at vit kunnu vinna, sigur Jóhan Danielsen at enda.

Avgerðin fellur í Klaksvík í dag

FLOGBÓLTUR-KVINNUR

Í dag kann avgerðin fella, hvør verður føroyameistari í flogbólti í meistaradeildini hjá kvinnunum í ár. Mjølnir og Dráttur hava alt árið ligðið jøvn á 1. plássi, men um Mjølnir vinnur dystin í KÍ-høllini í dag, er lítið at ivast í, at tær eisini klára at fáa føroyameistaraheitið til høldar.

Við einum sigri koma tær 4 stig fram um Drátt, og tá er lítið møguleiki hjá vágagentunum, at heinta Mjølnir aftur.

Javnt seinast

Tað eru ikki meira enn 14 dagar síðan at liðini hittust á Giljanesi, og tá leikaði hart á hjá báðum partum, men endin var at Mjølnir vann 5. og seinasta settið 15-10, og harvið dystin 3-2.

Mjølnir byrjaði ikki væl í tí dystinum, men vann seg tó spakuliga inn í dystin aftur, og tá so Dráttur gavst við at sláa bóltin, tá hevði Mjølnir vunnið.

Men Mjølnirliðið skal ikki føla seg ov trygt í dag, tí Dráttur hevur fyrr í ár vunnið á Mjølni, og við eini vælleikandi miðju og jugoslavanum Mariunu í essinum, kann alt henda.

Dysturin verður leygardagin kl. 13,00 í KÍ-høllini.

Aðrir dystir

Eisini leygardagin kl. 17,00 leika Fossanes og ÍF í KÍ-høllini. ÍF, sum í dag liggur á 3. plássi er favorittur til at vinna henda dystin, men Fossanes vil tó enn royna at prógva, at tær hoyra heima í meistaradeilini. Stórsti trupulleikin hjá teimum er móttøkan, so um tær fáa betri skil á hesa, kann roknast við at úrslitið verður betri enn í hinum dystunum tær hava leikt í ár, tí tær eiga enn ein sigur tilgóða, eftir teirra fyrsta ár í meistaradeildini.

Í Trongisvági

TB fær sunnudagin vitjan av havnagentum. Seinasta vikuskifti leikti Fleyr ímóti Mjølni, og tá var liðið fyri einum stórtapi, meðan TB enn einaferð tapti ein 3-2 dyst. Hesaferð ímóti ÍF.

Sostatt hava bæði liðini okkurt at prógva hetta vikuskifti, tí úrslitið kann fáa avgerandi týdning fyri, hvør endar næst niðast í meistaradeildini.

Dysturin verður í høllini í Trongisvági sunnudagin kl. 13,00.

Aftur havnardystur

FLOGBÓLTUR - MENN

Fram lá omaná seinast. Men seinasta vikuskiftið tók Fleyr øll á bóli, tá teir uttan trupulleikar vunnu 3-0 á oddaliðnum Mjølni í Klaksvík.

Um Fleyr leikar á sama hátt, sunnudagin kl. 15,30 á Eysturskúlanum, so er lítið at ivast í, at teir vera omaná hesuferð. Men 3 sett skulu vinnast. Í seinasta dystinum ímóti Fram vann Fleyr 1. settið, men so fánaði liðið burtur í einki.

Men kanska Johannes Ejsesgaard, sum ikki var við seinast, kann vísa, at tað var hann sum manglaði.

Rúni í essinum

Hjá Fram verður tað avgerandi, sum Rúni Weihe kann halda sama stíl, sum hann gjørdi ímóti ÍF seinasta vikuskifti, tá hann ikki var til at støðga. Men leikstílurin hjá Rúna er eisini treytaður av, at rumenin Romica finnur Rúna úti á kantinum við sínum hevingum.

Dysturin verður í øllum førum avgerðandi fyri bæði liðini, hvørt teirra skal liggja á bronsuplássinum eftir vikuskiftið.

SÍ til Klaksvíkar

Sørvingar skulu til Klaksvíkar. Seinasta vikuskiftið tapti Mjølnir tveir dystir, men um SÍ megnar at gera nakað við steypavinnararnar frá síðsta ár, er ivasamt. SÍ hevur ikki leikt við sterkastu manning, og liðið er samansett av ungum og eldri leikarum við Suna Hansen á odda, sum leikandi venjara. Suni hevur royndirnar, men um hann megnar at taka Trygva Poulsen og jugoslavan Borko á bóli er ikki sannlíkt.

Dysturin verður leygardagin kl. 15,00.

Alt klárt til steypafinalurnar 17. februar

FLOGBÓLTUR

Alt er nú klárt til steypafinalurnar, sum vera í Høllini á Hálsi leygardagin 17. februar. Hjá kvinnunum vera tað Dráttur og Mjølnir sum møtast, og hjá monnunum verður tað Mjølnir og ÍF.

Hetta er annað árið, at hesar finalur vera leiktar, og seinasta ár var tað Mjølnir sum vann báðar dystirnar, men ikki er líkt til, at hetta eisini verður galdandi í ár.

Men sannlíkindi eru fyri, at vit fáa tvær sepnnandi finalur, tí seinasta vikuskiftið leiktu mansliðini hjá ÍF og Mjølni, og tá vann ÍF 3-2, við úrslitinum 15-13 í seinasta settinum.

Eisini spenningur hjá kvinnunum

Kvinnuliðini í finaluni hava í ár eisini skifts um at vinna sína innanhýsis dystir, eins og bæði liðini hava vunnið hvør sína steypakapping. Dráttur vann FK-kappingina í Havn og Mjølnir vann NS-cup í Klaksvík.

Og fyri 2 vikum síðani leiktu liðini ein 3-2 dyst á Giljanesi, og henda vann Mjølnir.

Skipa fyri útferður

Úr øllum støðunum frættis, at skipað verður fyri bussferðum til finalurnar. Hevur ein áhuga at vera við til dystirnar, kann ein uttan iva fáa meira at vita hjá umboðsfólkunum hjá feløgunum. Hvørji hesi eru, sæst millum annað á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum www.fbf.fo

Í næstu viku frætta vit meira um dystirnar og hvørjir leikarar vera við á liðunum.

DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin